# Randers sendi B93 úr steypakappingini

**Rotturnar sigast nú rýma av søkkandi skútuni, sum rættuliga tykist ætla at repa seglini**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Meðan Øssur Hansen og landsliðsfelagarnir umborð á flogfarinum hjá Atlantsflog fóru suðuryvir og lendu í Slovenia mikukvøldið, stríddust liðfelagarnir hjá toftamanninum í B93 á heimavøllinum.

Talan var um síðsta dystin í fjórða umfarinum í donsku steypakappingini. Gestirnir á Eysturbrúgv vóru Randers Freja, sum Atli Gregersen spælir við. Og tað vóru gestirnir, ið vunnu, og harvið eru við í lutakastinum til fimta umfarið, sum verður spælt mikudagin 24. oktober.

B93 hevði bóltin mest, men Randers Freja vann 2–0. Fyrra málið fingu teir við brotssparki í 25. minutti, og seinna málið skoraðu teir sjey minuttir seinni.

## Lønarlækking

Donsku fjølmiðlarnir hava síðstu dagarnar gjørt nógv burturúr fíggjarliga tronganum, sum B93 er í. Í felagnum ásanna teir, at útreiðslurnar eru væl størri enn inntøkurnar. Tí verða tiltøk nú sett í verk, og eitt av teimum er lønarlækking. Sagt verður, at B93 hevur sjey spælarar í fulltíðarstarvi, og at hesir fara at fáa minni í løn. Tað er okkum ikki heilt greitt, um Øssur Hansen, sum er leigaður út frá B68 og til B93, inntil kappingin um mánaðarskiftið fer í vetrarfrí, er roknaður uppí hesar sjey, men Øssur er í løtuni fulltíðar spælari í B93.

Í donsku pressuni verður sagt, at nú verður fulltíðar fótbóltslívið í B93 skift út við parttíðar fótbóltsarbeiði. Tað verður eisini sagt, at um onkur av spælarunum finnur ein annan arbeiðsgevara, sum vil rinda teimum løn, so eru skulu teir verða loystir frá sáttmálanum við B93 beinanvegin, og uttan at felagið fer at krevja gjøld av nøkrum slagi.



*Felagið hjá Øssuri Hansen, B93, er í fíggjarligum trupulleikum í løtuni*

Lagt verður afturat, at spælararnir sjálvandi hava møguleikan at halda seg til sáttmálan og krevja ta lønina, sum teir sambært sáttmálanum eiga, men so fer B93 á húsagang, verður sagt.

# U–19 sveinaroyndin verður í Slovenia

**HB eigur flest spælarar í átjan manna hópinum, sum skal royna seg í EM undankappingini**

UNGLINGALANDSLIÐ
*Jóannes Hansen*

Í morgin skal a–landsliðið royna seg í HM undankappingardysti í Slovenia. Í sovorðnum førum er tað oftast soleiðis, at somu tjóðir kvøldið undan a-landsdystinum spæla U–21 landsdyst. Tað verður ikki gjørt í Slovenia í kvøld, tí FSF hevur higartil ikki hildið tað vera ráðiligt at melda U–21 landsliðið til slíkar kappingar.

Men føroyingar hava eitt U–19 landslið. Teir skulu frá 22. og til 29. oktober taka lut í EM undankappingarbólki í Slovenia. Um teir standa seg væl, so verður tað – í hvussu so er út frá einum ítróttarligum sjónarmiði – lættari hjá Fótbóltssambandinum at meld-a U–21 landsliðið til komandi undankappingar.

## Kend nøvn

Jógvan Martin Olsen er í Slovenia saman við Allani Simonsen og landsliðsspælarunum. Hann er U–19 landsliðsvenjari og skal tískil niður aftur til Slovenia um tvær vikur. Undan fráferðini úr Føroyum gjørdi hann av, hvørjir átjan spælarar skulu manna U–19 landsliðshópin.

Talan er fyri tað mesta um kend nøvn. Hetta eru spælarar, sum tey seinastu árini hava verið fyrst á U–17 landsliðnum, og sum síðani hava verið á U–19 landsliðnum. Tólv spælarar eru føddir í 1983. Tað vil siga, at hetta er síðsti møguleikin hjá hesum spennandi árganginum at vísa, hvussu nógv teir hava fingið burturúr fótbóltsuppalingini og altjóða royndunum, sum teir seinastu árini hava fingið høvi at vera við í.

Fýra spælarar eru frá 1984, og tveir – Rasmus Nolsøe úr TB og Rókur Jespersen úr HB – eru føddir í 1985.

HB vann FM í unglingadeildini í ár. Teir eiga fimm spælarar í átjan manna hópinum, og tað man kennast hugaligt hjá HB, sum leingist eftir tilgongd av góðum spælarum. Ein HB spælari, sum hevur verið fastur fúsur á landsliðnum saman við 1983 árganginum, er ikki við hesa ferð. Tað er Vagnur Mohr Mortensen, sum ikki er komin seg heilt, eftir at hann leingi hevur verið skaddur.

Manningin, sum seinni í mánaðinum skal umboða Føroyar í Slovenia, sær soleiðis út: Pól Næs Joensen, HB, og Heini Jacobsen, Sumba, eru málverjar. Útispælararnir eru Áki Petersen, ÍF, Atli Danielsen, KÍ, Bárður Christiansen, HB, Bjarni Jørgensen, HB, Jón Rói Jacobsen, HB, Jann Ingi Petersen, B68, Símun Joensen, KÍ, Gilli Haraldsen, Frederikshavn, Heini í Skorini, B36, Hjalgrím Elttør, KÍ, Kári í Lágabø, VB, Bárður Dimon, TB, Rasmus Nolsøe, TB, Áki L. Hansen, NSÍ, Kai Ennigarð, GÍ, og Rókur Jespersen, HB.

Ikki færri enn trettan av hesum spælarunum hava í summar verið meiri og minni at sæð í 1. deild. Hinir hava umboðað besta liðið í felagnum, sum teir spæla fyri.

## Tríggir dystir

U–19 landsliðið skal á venjingarlegu í hesum vikuskiftinum. Teir skulu møta á Svangaskarði fríggjadagin klokkan 18.00, og har skulu teir halda til inntil leygarkvøldið. Nú kappingarárið heima á landi er liðugt, heitir venjarin á spælararnar um at venja sjálvir tríggjar ferðir um vikuna.

Ferðalagið fer úr Føroyum 22. oktober. Fyrsti dysturin verður í Slovenia mikudagin 24. oktober klokkan 11.00. Hann verður ímóti Skotlandi. Fríggjadagin 26. oktober klokkan 15.30 verður spælt ímóti Slovenia, og síðsti dysturin verður sunnudagin 28. oktober klokkan 15.30 ímóti Grikkalandi. Ferðalagið kemur aftur til Føroya mánadagin 29. oktober.

Mánadagin 8. okt.
byrjar stór útsøla
í Varlant í Saltangará
Seingjarklæði, dúkar, stell, bestikk. gløs,
Royal Copenhagen stakar, vasar,føt o.a.
Alt fer fyri
-25%
Kom inn á gólvið og ger kvettið!
Varlant • Vøggan• Inntech
Tlf. 449 588 • Fax 449 499



**Lærlingur**

Seytjan í Klaksvík søkir lærling.

Hevur tú FHS ella HH, er dugnalig/ur og røkin, og áhugað/ur at seta snið og litir saman, send so eina skrivliga umsókn til Seytjan.

Seytjan
Box 127
110-Tórshavn
Freistin at søkja er 10. oktober

**Handilslærlingur søkist**

Søkt verður eftir handilslærlingi til goymslu okkara, at byrja skjótast gjørligt.

Umsøkjararar við HH ella FHS útbúgving, hava fyrimun.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. okt. 2001.

el-talvuvirkið í Gøtu sp/f
512 Norðragøta

TK Stovan

**Ring!
Vit koma**

**TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.**

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

**31 73 66
www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

**Programmteknikari**

Starv sum programmteknikari í Útvarpi Føroya er leyst at søkja. Starvið verður at seta skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Tann, sum settur verður, skal arbeiða á teknisku deild. Arbeiðið fevnir m.a. um sendivaktir og framleiðsluvaktir. Góð 60% av senditíðini hjá ÚF er uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Krøv til umsøkjaran:**
- innlit í ljóðtøkni, helst á útvarpsøkinum
- fyritreytir fyri at arbeiða við ljóði á teldu
- hollan teldukunnleika, við serligum atliti til Windows 2000 stýriskipanina

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og áhugavert arbeiði, har tú støðugt hevur møguleika fyri persónligari menning og sleppur at brúka tíni skapandi evni
- eitt arbeiði við sera skjótari tøkniligari menning
- eitt sjálvstøðugt arbeiði, har tú í stóran mun hevur ávirkan á úrslitið.

**Vit ynskja:**
- At tær dámar at arbeiða í skiftandi vaktum, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð.
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og eisini samstarva í bólki.
- At tú dugir at loysa trupulleikar, tá á stendur
- At tú hevur góð samstarvsevni og kanst koma við íkasti til menning av deildini.
- At tær dámar at skapa nakað sjálv/ur
- At tú hevur hegni til at brúka tónleik í tínum arbeiði
- At tú hevur útvarpsrødd.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Umsóknir skulu vera útvarpinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. oktober 2001.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Andor Johannesen, leiðara á teknisku deild.

**Útvarp Føroya**
Postboks 328, 110 Tórshavn, tlf. 316566

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

**Skeið í
AUTODESK INVENTOR**

| | |
|---|---|
| **Innihald:** | Uppbygging og nýtsla av Autodesk Inventor |
| **Tíðarskeið:** | 16., 17. og 18. okt. 2001 okt. kl. 08.10-15.20 |
| **Skeiðleiðari:** | *Jacob Frederiksen, CDLight, Horsens* |
| **Kostnaður:** | kr. 3.500,- íroknað frálæru, tilfar og mat |
| **Stað:** | El-deildini á 1. hædd, Smiðjugerði |
| **Tilmelding:** | **Í seinasta lagi 11. okt. 2001** |

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Mentamálstýrið og Vitan fáast á Skeiðsdeplinum

*Skeiðið verður hildið treytað av, nóg nógvir luttakarar tekna seg.
Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og til meldingarblað fáast við at venda sær til*

**SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2371, P/F Funningslaks, 478 Elduvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Klaus Langvad Jensen, Vingsted Skovvej 11, DK-7182 Bredsten (formaður), Bjarne Reinholdt, Skernvej 31, DK-6933 Kibæk og Kári Nielsen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Odd Eliasen, Mørkin 8, 530 Fuglafjørður (formaður) og Justinus Leivssonur Justinussen, 480 Skála.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Kári Nielsen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Bogi Jacobsen, Miðrás 3, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya tann 3. oktober 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2502, P/F Deep Sea ltd., 800 Tvøroyri.

Viðtøkur broyttar: 19.04.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 4.055.000,00 til kr. 6.905.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 1.925.000,00 til kurs 200 og kr. 2.130.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 3. oktober 2001

Kristin Balle

**Pedagogar**

Søkt verður eftir :

1 pedagogi, 30 t. um vikuna, til eina stovu við 12 vøggustovubørnum frá 1. november 2001 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 8 pedagogar, 4 hjálparfólk.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett ístaðin.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 19. oktober 2001.

**Kongshavnar Barnagarður og Vøggustovu**
Heiðavegur
Postboks 119
Fo-600 Saltangará

Restorffs ASSU